JRC

Japan Radio Co. Ltd.

RADAR 1000
6“ LCD Skerm.
16 Fjóðringar.
1,5kW sendara.
Vanligur prísur 10.995,-
Nú 9.495,-

Vit hava eisini størri Radarar við avsláttri upp til 20%

Lit Ekkólodd frá 200Watt til 10kW.

GPS KUMPASS

Tilboði er galdandi til 28 feb.

VIKMAR
Vestara Bryggja
100 Tórshavn
Tel. 352182

Elektronikbúðin
V/Paula Poulsen
900 Vágur
Tel. 373529

STORNO
Handan á 6
100 Tórshavn
Tel. 314414

Lýsið
við
brúktum
bilum

Sosialurin
www.sosialurin.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Fótbóltsvenjaraskeið – er tað nakað fyri teg?

Fótbóltssamband Føroya skipar í samstarvi við feløgini fyri grundskeiðum í fótbóltsvenjing í februar og mars 2002.

Dagur	Skeið	Stað
1. – 2. feb.	A – Byrjunarvenjing	Gøta
15. – 16. feb.	B – Fysisk venjing	Toftir
22. – 23. feb.	D – Teknisk venjing	Tórshavn (HB-húsið)
1. – 2. mars	C – Venjarastarvið	Fulgafjørður
8. – 9. mars	E – Taktisk venjing	Tórshavn (B36-húsið)

Hvørt skeiðið er 12 tímar (vanliga fr. kl. 18-21 og ley. kl. 9-18). Neyðugt er at hava lokið skeið A – Byrjunarvenjing fyri at kunna luttaka á hinum skeiðunum. Aldursmarkið er 15 ár.

Instruktørar: *Bjørn Krog, Eli Hentze, Jógvan Martin Olsen og Petur Simonsen.*

Tilmelding: Áhugaði kunna sjálvi boða frá luttøku til FSF ella gjøgnum egið felag.

Tilmeldingin skal vera skrivlig (brævi, faxi ella telduposti).

Freistin at boða frá luttøku er úti 7. februar – tó er tilmeldingarfreistin fyri skeið A úti 29. januar.

FSF skilar sær rætt til at velja burtur úr, um ov nógvir luttakarar eru til okkurt av skeiðunum – í mesta lagi 24. Hvørt skeiðið er treytað av nóg góðari undirtøku – í minsta lagi 10.

Luttøkugjald: Skeið A 100 kr., hini skeiðini 150 kr. fyri hvønn luttakara.

Meira fæst at vita um skeiðini við at venda sær til FSF-skrivstovuna.

Fótbóltssamband Føroya
Gundadalur • Boks 3028 • FO–110 Tórshavn
tlf. 316707 • fax. 319079
t-postur: gudrid@football.fo

formula XEROX

ATLANTIC AIRWAYS

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

Barnaansing
– rættur ella krav?

Pallborðsfundur verður í kvøld kl. 19.30 í Norðurlandahúsinum.

Foreldrafelagið í Havn

Brøyt til sølu

Um nóg høgt tilboð fæst, er ein Brøyt X-21 seria II, árgangur ´89 hjá Sørvágs Kommunu til sølu.

Sørvágs Kommuna
FO-380 Sørvágur
tlf. 332004 – 210504

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TIL SØLU
Mitsubishi Galant 2.4 GDI, árg. 2000, koyrt 20.000 km, 16“ sportfelgur. Eitt sett av felgum fylgja við. Nýggjan fløguspælara. Bakspoilara og frontspoilara við tokulyktum. Rustviðgjørdur.
Tlf. 214032

BILUR TIL SØLU
Hvítur VW-Polo til sølu fyri 5.000 kr. Koyrir fínt.
Tlf. 261622 e. kl. 16

GER KVETTIÐ!
Opel Astra 1.6, árg. 06/01. Nýprísur: 160.000 kr. Til sølu fyri 125.000 kr.
Tlf. 316130 ella 227493

HYGG HER!
Ein Suzuki Swift 1.3 bíliga til sølu, árg. 86. Ring og hoyr meira.
Tlf. 252800

SPORTFELGUR TIL SØLU
Fýra BMW sportfelgur 15“ til sølu.
Tlf. 223187

TOYOTA CAMRY 1.8 XL
árg. 87, km 190.000, powerstýring, alu-felgur, sýnaður des. 2001, koyrir væl og sær gott út, til sølu fyri uml. 20.000 kr.
Tlf. 226467 e. kl. 15

HONDA CIVIC
árg. 3/2000, sum nýggjur, hevur staðið inni hvørja nátt. Ring og fá meira at vita.
Tlf. 310352

FORD ORION
árg. 85 til sølu. Koyrir væl, men treingir til ábøtur. Kann eisini brúkast sum eykalutir til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 319428 ella 212006

DEILIR YNSKJAST
Bilurin hjá mær manglar ein høgra forskerm, kúfangara framman og eina baklúku. Sig mær frá, um tú hevur nakað av hesum. Vinarliga ring á
tlf. 226772

TIL SØLU
Toyota Carina II 1,6 XLi.
Tlf. 444130

TOYOTA AVENSIS
reyður, 2,0 D-4D, senkaður, hevur 17“ sportsfelgur, km. 49.500, árg. mai 2000, til sølu.
Tlf. 250736

HONDA ACCORD TIL SØLU
Honda Accord 1.8i LS, árg. november '99. 4 x Airbag, servostýring, el-rútar, el-spegl, fjarstýrt sentrallás, Pioneer stereoanlegg, tokulyktir, frontspoilara, alufelgur, píkadekk, koyrt 47.000 km.
Tlf. 226022

TIL SØLU
Nissan Almera 1.8i Elegance til sølu. Árg. 12/2000, koyrt 21.000 km. Mest sum alla útgerð, ið kann hugsast. Nýprísur 178.000 kr. Meira fæst at vita á
Tlf. 216553, e. kl. 17

TIL SØLU
Ein Ford Escort 1.6 Ghia, árg. 87, og ein Ford Escort 1.6 Savoy, árg. 87, til sølu fyri 2.000 kr. stk. sum eykalutir.
Tlf. 252341

OPEL ASCONA 2.0i
til sølu fyri 14.000 kr.
Tlf. 314131

NISSAN BLUEBIRD 2.0 SLX
árg. 89, til sølu. Bilurin hevur píkadekk á alu felgum, summardekk á sportsfelgum, Kenwood stereoanlegg, 260 w hátalarar. Bilurin er í góðum standi.
Tlf. 257484

MAZDA 323 1500
árg. 87, sýnaður 10/1-02, við píkadekkum, til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 215540 ella 310337

EYKALUTIR YNSKJAST
til Mazda 323 við 3 hurðum, serliga vinstra hurð, alt kann brúkast.
Tlf. 251439

KOM OG GEV EITT BOÐ!
Eg selji bil mín. Talan er um ein Chevrolet Monza, árg. 89, koyrt 93.000 km, hevur powerstýring og koyrir annars væl. Hevur tú tað besta boðið áðrenn mikudagin 30. jan., so er bilurin tín. Tó hava boð yvir 6000 kr. ongan áhuga! Hevur tú eitt boð ella vilt spyrja um okkurt, so ring á
Tlf. 320415 / 227705

TOYOTA COROLLA 1.6 XLI
Vælhildin Toyota Corolla 1.6 XLI, árg. 3/96 til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 282501

TIL SØLU
Mercedes 280 SE bíliga til sølu.
Tlf. 313572

TIL SØLU
Opel Kadett 1,6, árg. 88, 190.000 km, væl hildin, 8000 kr.
Tlf. 320828

NISSAN SUNNY 16 LX N13
árg. 87, til sølu fyri 4.000 kr. Hevur plátur.
Tlf. 225266

NISSAN PATROL
árg. 88, til sølu. Hevur píkadekk, Summardekk á felgum fylgja við.
Tlf. 211525

HYUNDAI ELANTRA
1600, koksgrátt metallakk, koyrt 12.000 km, árg. okt. 2000, eyka alu sportsfelgur + eyka felgur til vetrardekk, Blaupunkt discannlegg. Nýprísur kr. 160.000,- til sølu fyri hægsta boð yvir kr. 100.000,-.
Tlf. 215214

Amboð

YNSKIST
Hevur nakar eina maskinu at buka fisk við at selja mær, so ring
Tlf. 313877

Arbeiði

ALT FYRIFALLANDI
arbeiði verður gjørt av tilkomnum manni, ið er handverkari.
Tlf. 310352

ARBEIÐI SØKIST
15 ára gomul genta søkir arbeiði eftir skúlatíð og møguliga í vikuskiftinum. Alt hevur áhuga.
Tlf. 424520

Barnaansing

BARNAANSING
Er nakar, sum tímir at ansa eftir Eyðun, meðan mamman er til arbeiðis. Sera góður at hava við at gera. Royndartíð 1 mór.
Tlf. 213610

Barnaútgerð

TIL SØLU
Barna tremmusong v/ madrassu biliga itl sølu.
Tlf. 447451

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Kombivognur við babylift, dýnu og kodda til sølu fyri 1200 kr.
Tlf. 328138

BARNASONG
Furusong við madrassu (170 x 70) til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 311581 eftir kl. 18

BARNAVOGNUR
Svartur barnavognur, keyptur í Skemmuni, brúktur í 6 mór., til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 253065

TIL SØLU
Babylarmur av merkinum Brio til sølu fyri 500 kr. Nýprísur uml. 1.000 kr.
Tlf. 310323 ella 251223

BILSTÓLUR
Myrkabláur, ternutur bilstólur, 0-13 kg, av merkinum Britax, til sølu fyri 500 kr. Nýprísur 1.000 kr.
Tlf. 316257

BRIO KOYRISTÓLUR
Leðurlook Brio koyristólur v/ kalesju, regnslag, leðurlook posa til sølu.
Tlf. 332244

STÓLUR TIL SØLU
Hokus Pokus stólur v/ borði til sølu.
Tlf. 332244

BARNAVOGNUR
Ein myrkabláur Simo barnavognur og ein babylift bíliga til sølu.
Tlf. 316798 eftir kl. 17

BARNAVOGNUR
Vælhildin, myrkabláur Odder barnavognur við regnslagi til sølu fyri 1.800 kr.
Tlf. 321715

Bátaútgerð

BÁTAMOTORUR YNSKIST
Av slagnum ARONA 36 HK, sum kann nýtast til eykalutir. Ella eitt toppstykki til sama motor.
Tlf. 313197 ella 213161

TIL SØLU
Vágaspæl til sølu.
Tlf. 444737

BÁTAMOTORUR TIL SØLU
Yanmar bátamotorur 18-22 HK. Vekt 104 kg – koyrt 540 tímar.
Tlf. 313302

8-MANNAFAR
(kaldbaksbátur) v/ VHF og gummibáti til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 283374

PÁHANGSMOTORUR
Mariner 15 HK páhangsmotorur til sølu.
Tlf. 316502

YNSKIST
Útróðrarbátur við fiskiloyvi ynskist til leigu til Norðhavsútróður.
Tlf. 311915

GEARKASSI YNSKIST
til ein Volvo Penta motor MD 11c 25 HK.
Tlf. 423538

PUMPA
Nýggj hydralik-pumpa við magnetkobling til sølu.
Tlf. 441981

TIL SØLU
Brúktur Volvo Penta Tamd 31 A, 110 HK við skrúvu og stuttum aksli, koyrt 8000 tímar, til sølu.
Tlf. 256732 ella 332884

SNELLUR
Tvær automatiskar vágasnellur (oljutrýst) til sølu.
Tlf. 444539

Bingo

GOTT BINGO
verður sunnudagin 3.2. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1.000 kr. Eykaspælið 1.000 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu sunnudagin 3. febr. 2002 kl. 16. Høvuðsvinningur í lutaseðlinum er eitt gávukort á 1.000 kr. Koyring heim aftaná.
2000 B í Hoydølum

GOTT BINGO
verður í Róðarneystinum á Argjum hóskvøldið 7. februar kl. 19.00.
Argja Bóltfelag

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu hósdagin 31. januar kl. 19.00. Full pláta 500 kr. Á lutaseðli trý gávubrøv á 1.000 kr. Eykaspæl og bingola spæl verða. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kyndil

GOTT BINGO
verður í TB-húsinum tórsdagin 31. jan. kl. 19.00. Høvuðsvinningur 2 x 500 kr. Eykaspæl verður eisini.
Tvøroyrar Bóltfelag

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði hóskvøldið 31. jan. kl. 19.30.
Eldrafelagið Borgin

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík týskvøldið 29. januar kl. 19. Full pláta 300 kr. Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á 1000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

EIGUR TÚ BÓKINA
"Ledelse og Samarbejde" hjá Henning Heltbech og Jens Jacobsen og ætlar at selja hana, so ring
tlf. 253071

Burturm. /funnið

BURTURMIST
Gulur Fjällräven ryggsekkur blivin burtur t. 4. des. í miðbýnum í Havn, møguliga gloymdur í onkrum handli. Í ryggsekkinum er eitt sett av lyklum o.a.
Tlf. 316300

BURTURMIST
Hevur nakar sæð/funnið tvær brølapur í Havn? Onnur er ljósareyð, hin er lillafarvað. Navn og tlf. nr. stendur í báðum.
Tlf. 315548

BURTURMIST Í HAVN
Hevur nakar sæð/funnið eina gráa, ullinta brølapu við ljósareyðum kanti? Tað er nakað síðan hon bleiv burtur.
Tlf. 315548

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST
Pensionistapar í 70 ára aldrinum ynskir íbúð í Havn. Skriva til:
Sosialurin,
Box 76,
110 Tórshavn.
Bill. mrk. 1268-4

VIT ERU
eitt par við einum barni, sum fara at flyta til Danmarkar í eitt ár í fyrsta umfari. Tí sóknast vit eftir fólki, sum ætla sær hendavegin og sum kunnu býta um hús við okkum. Tað skal vera í juli/august har á leið. Húsini hjá okkum standa miðskeiðis í Tórshavn.
Skriva til:
Sosialurin,
Box 76,
110 Tórshavn.
Bill. mrk. 1268-2

SETHÚS/ÍBÚÐ
ynskjast til leigu í Sundalagnum skjótast gjørligt.
Tlf. 422267

ER ONKUR
sum hevur eini hús ella íbúð til leigu ella sølu, sum er hóskandi til 2 vaksin og 3 børn í Havn ella nærhendis til 1. mars, fyri sámuligan pris.
Tlf. 313183 ella 316249

HÚS Í SVANGA
til leigu frá 1. februar og 3 mør fram. Kr. 4.400/mán + el og hita. Depositum 1 mánaða húsaleiga krevst.
Tlf. 32886781

OLJUFÓLK !
eru vit ikki, men par, ið søkir egnan bústað í høvuðsstaðarøkinum fyri rímiligan prís. Hava fast starv, roykja ikki og eru røkin. Hava tit svarið, so ringið á tlf.
212484 ella 313588 eftir kl. 20

TIL LEIGU
Kamar undir Gráastein til leigu. 15 fermetrar til støddar, ljóst og nýmálað. Atgongd til køk, brúsu og vaskimaskinu.
Tlf. 219608

HJÁLP!
Hús ella íbúð ynskist til leigu beinanvegin fyri max. 3.400 kr. v/ ljósi og hita. Helst í Havn.
Tlf. 258048

KAMAR YNSKIST
20 ára gomul friðarlig genta, hevur arbeiði, søkir kamar til leigu í Havn. Áhugaði vinarliga ringið á
tlf. 310994 eftir kl. 17

HJÁLP!
Hús ynskjast til keyps fyri uml. 450.000 kr.
Tlf. 258048

HÚS YNSKJAST
til leigu í Havn. Vit kunnu lata 8.000-10.000 kr. í leigu um mánaðin.
Tlf. 224864 ella 281546

KAMAR YNSKIST
21 ára gamal íslendingur leitar eftir kamari til leigu í Tórshavn.
sindrithor@hotmail.com

ÍBÚÐ Í FUGLAFIRÐI
til leigu.
Tlf. 444454

KAMAR YNSKIST
Eg eri 22 ára gamal, lesi á NVD, royki og drekki ikki og fari væl um. Ynski eitt kamar v/ atgongd til køk og wc/bað fyri sámuligan prís.
Tlf. 222891, Rúni

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt friðarligt par, ið leitar eftir íbúð í Havn ella á Argjum. Vit fara væl um og hava bæði fast og vælløn arbeiði.
Tlf. 228128 / 226477

Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Bræváskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:

Navn:……..

Bústaður:……

Bygd/býur:……

Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki